

*Jákup Olsen her saman við Magna Arge, formann í Føroya Oljuídnaði og Ivan Simonsen frá Telefonverkinum í útgerðarhavnini í Peterhead. Mynd jan*

landhonding frá supplyhavnini Peterhead til pallin Magnus og 21 tímar at sigla til tann vestasta pallin Foinaven vestan fyri Hetland. Uppá fyrispurning frá mær segði tann eini, at um tað kom uppá tal, so kom helt at verða 1 supplyhavn í Føroyum, og at tað bleiv tann, sum var best egnað og odýrast í gjaldi og lá nærmast við borøkið.

Frá B.P. varð kovið aftur til stevnuøkið, og tey, sum ta høvdu hug, kundu verið á einari bussferð til supplyhavnina Peterhead. Hetta vildu Martin Karl og eg og fóru við.

Hetta var ein sera áhugaverdur partur av ferðini. Upplandið og keiøkið var stórt í Peterhead, tó ikki so stórt, at tað ikki kann finnast slíkt á einum føroyskum firði.

Atløguøkið var sum sagt stórt, og dýpdin við innastu bryggjuna máldi 6-7 metrar á fjøru, og longdin á atløgubryggjunum var um 2 km til samans. Tó vóru aðrir fa... hetir s.s. tangar og síløir í stórum tali, sum nýttir vóru til cement, borimoru, olju til supplybátarnar og m.a. Fitt nú skuldi vatngoymslan vera ógvuliga stór, tí supplybátarnir tóku úr 4.500 tonsum upp til 800 tons av vatni, og tað skuldi takast inn uppá heilt stutta tíð. Havnalagið skuldi vera stórt, tí har skuldi m.a. liggja í fugvavís av bátum. Felagið, ið raddi fyri borgum her, bar navnið ASCO. Til seinast á vitjanini vóru vit boðin upp í conferencerúmið hjá teimum, har leiðarin greiddi eitt sindur meira frá, og spurningar vóru settir honum.

Inni her bórust okkum stórtíðindini, at Føroyar høvdu javnað út til 1-1 ímóti russum í E.M. kappinginum á Svangaskarði.

Vit hildu síðani leiðina longur vestur inn ímóti hálendinum, har víst var okkum á eitt sera gott stað at eta døgurða. Her fingu vit at hoyra um 2-1 ímóti russum.

Veðrið var av tí allar fagrasta hendan dagin, so seint varð farið til songar hetta kvøldið, eftir at vit vóru komin aftur til Aberdeen eftir ein stuttan og hendingaríkan dag.

**TORSDAGUR 7. SEPT.**

Tíðliga varð farið upp eins og hinar morgnarnar, men nú var ikki útfarandi, sum tað oyst regnaði.

Fyrraparturin vóru havnaumboðini fyri Klaksvík, Runavík, Tórshavn, Martin Karl og eg sjálvur boðnir oman at vitja Aberdeen Harbour. Tann uniformeraði havnarmeistarin sigldi okkum ein rundtúr í lósbáti sínum og greiddi samstundis frá, hvat virksemi fór fram í hesari stóru havn, bæði frá tikk- og fiskahavnini. Her vóru øll tey stóru oljufeløgini við sínum virksemi, bæði supplyvirksemi og smærri umvælingarvirksemi.

Eisini komu supplybátar úr havnini í Peterhead niður til Aberdeen at liggja, tá ið teir ikki vóru í virksemi í styttri ella longri tíð ella til umvælingar.

Eftir hendan langa siglitúrin vóru vit boðin niðan á Aberdeen Harbour office, ið húsaðist í einum húsum, ið vóru 150 ár, og har hevði havnarskrivstovan altíð verið. Har fingu vit ein góðan kaffimunn saman við havnameistaranum og einum av hansara 35 hjálparfólkum.

Nú var veðrið so fóluliga fint, at vit kundu nýta restina av degnum til at siggja býin og brúka nakað av peningi í teimum skotsku storhandlunum. Aberdeen er ein ógvuliga vakur og reinur býur.

**FRÍGGJADAGUR 8. SEPT.**

So upprann seinasti dagurin í Aberdeen á hesum sinni. Tveir dagar høvdu vit havt við góðveðri og tveir við regni. Hesin seinasti dagurin byrjaði við regni eins og dagurin frammanundan.

Tíðliga á morgni fóru vit ein túr í býin og so út aftur á stevnuna, har vit vóru til kl. knapt 4. Tá endaði stevnan, og hvør fór til sín.

Vit koyrdu inn í býin og vóru har til kl. 6. Tá fóru vit 4, sum høvdu búð á Stuart Lodge, út á flogvøllin, eftir at hava sagt tí søguríku Bon Accord Street farvæl sannandi orðini, ið søgd verða um hana: Happy to meet, sorry to part, happy to meet again.

Tað tók flogfarinum 1 tíma at flúgva til Føroya, og vit lendu í Vágum kl. 9. Á miðnátt vóru vit í Havn.

Ferðin til Aberdeen, the Flower of Scotland, hevur givið okkum dýran førning heim við aftur, við bæði upplivingum, avdúkingum, hugsanum og hugskotum. Tað er bert eftir hjá okkum at seta tað saman á rættan hátt og fáa nakað munagott burturúr, men tó rætur um at ansa væl eftir at fáa alt hetta gjørt í satt og semju innanlands sum uttanlands.

Vit takka ferðalagnum fyri eina góða samveru hesar dagarnar.


OKKARA DYGD -TÍN TRYGD!

HJÁ OKKUM FÆRT TÚ: DYGDAR FRAMKALLAN
1. flokks myndir * Kodak Royal-pappír * Myndagaranti * Avsláttarkort * Fotoalbum

Postboks 1058 · 110 Tórshavn · Tlf. 19820

SMS FOTO & VIDEO
ramasta

Vit taka myndir tínar í álvara



FRAMSÝNING



Framsýning av nýggjum BLINK-húsi á horninum Lykkjugerði/Velbastaðvegur verður

LEYGARD. KL. 14.00 - 16.00
og SUNNUD. KL. 16.00 - 17.00

ella eftir nærri avtalu...

Her er møguleikin fyri at ogna sær dreymahúsini!

Prísuppskot: Min. kr. 900.000,-

Møg. grundstykki kann ganga inn í keypið.






# Tórshavn– Suðurstreym

## HYGGIÐ HER!

**Klaksvíkar Dampvaskarí og Kemisk Reinsan**

**bjóða tygum eina betri tænastu**

**Latið toyið inn hjá Toyhandlinum SEYTJAN Áarvegi 12, tlf. 11305**

Vit átaka okkum at vaska/reinsa alt vanligt toy.
Eisini gardinur av øllum sløgum.
Dúkar verða vaskaðir og stívaðir
Eisini leiga vit dúkar út til veitslur o.a.
Olju-dálka toy hava vit góðar royndir at vaska/reinsa.
Dýnur og koddar vaska/reinsa vit eisini.
Altíð fyrsta floks.
Skjót og góð avgreiðsla.

**Nýggjaveg 26, 700 Klaksvík
Tlf. 55160**